# Kjak



Jákup av Skarði

## YES! Nú verður tað...

...ella tað var í hvussu er fyrsti tankin, tá ið eg beit merki í, at Sosialurin og Johan Dahl, landsstýrismaður - av sínum eintingum - bóru fram alla bls. 8, t. 19. januar 2011, um nýggju ferjuna til Nólsoyar.

Nú landsstýrismaðurin, og onnur við makt, hava havt tríggjar vikur "...at umhugsa at flyta 20 av teimum 25 milliónunum frá einum havrannsóknarskipi til eina nólsoyarferju..." lysti mær at frætta hvør gongd er í málinum. Talan var um "... eina kollveltandi útmelding í samband við raðfesting av strandfaraskipunum.." men tó hevur einki nýtt verið í miðlunum um hvørja móttøku hetta fær millum tey fólkavaldu.

Væl vitandi, at týdningarmiklir leikir verða leiktir handan leiktjøld, og at bert lítil partur verður borin fram í miðlunum, loyvi eg mær tó at seta hesi orð fram, við ynskjum um at okkurt afturat verður kunnað okkum um gongdina í verkætlanini.

Undirritaði hevur fleiri ferðir fingið skotið í skógvarnar, at hetta er ikki tíðin at byggja skip og at landskassin hevur ikki fíggjarligar møguleikar at seta slíkt arbeiðið í gongd. Tá loyvi eg mær at spyrja: Hava vit ráð at lata vera?

Verður verkætlanin sett í verk, so er okkum í arbeiðsbólkinum sagt, at talan er um 1½ ár, frá skitsuprojektið til ferjan flýtur í Nólsoyarfirði. Skitsuprojektið er liðugt og taka við so annað fyrireikandi arbeiði við, so er áleið eitt ár eftir, ið aktiverar eina rúgvu av arbeiðsfólki og hevur við sær at nógvum familjum er tryggjað ársinntøku, heldur enn at ganga arbeiðsleys! Her er bæði talan um trivnað, lívsgleði og at varðveita kunnleikan um skipabygging.

Sjálvsagt kunnu uttanfyristandandi bera fram: Ja, men tit hava fingið nýtt og stórt skip, hvat grenja tit um? Hartil er bert at siga, at tá ið vit kundu gleðast saman við norðoyingum, um at tey fingu 40 ára gamalt skip, ið loysti teimum nógvar trupulleikar, fingu vit 30 ára gamalt skip, ið gav okkum møguleikar og skapti nýggjar trupulleikar.

Samstundis sum vit hava samkenslu við teimum, ið hava mist avvarandi, so kunnu vit staðfesta, at seinastu tvær jarðarferðirnar hevur líkbilur verið í oynni og sett sín dám á hesar løtur - í mun til áður, tá ið lík-kistur vórðu lyftar í krana og fluttar í traktorlast.

Samstundis sum vit kunnu ilskast inn á avlýsingar fyri veður og tekniskt brek, so kunnu vit staðfesta, at tað er munandi lættari at stoypa kei og flyta rusk, nú rúmligt er á bildekkinum.

Samstundis sum vit kunnu fegnast um at lyfta er í Ternuni, kunnu vit staðfesta, at hendan fleiri ferðir ikki hevur verið til at stóla uppá og hevur verið atvoldin til at ferðandi hava verið innistongd.

Hvat er so at gera?

SET VERKÆTLANINA Í GONGD!

Arbeitt hevur verið fram til eina skilagóða skitsu, har talan er um:

**1)** Nýggja ferju - og tann byggikunnleika (know-how) ið harvið er í landinum.

**2)** Ferju sum hevur nøktandi men ikki ov stórt bildekk.

**3)** Lægri ferju, ið harvið skuldi lætt um siglingina um vindur er.

**4)** Ferðafólkarúm í somu hædd sum bildekki, har fólk ikki noyðast í lyftu.

**5)** ...og ikki minst, arbeiðsskapandi tiltak í hesum arbeiðsleysu tíðum.

Tí verður áheitanin á Johan Dahl, landsstýrismann, Sosialin og aðrar miðlar, at tit samstarva um at halda lív í verkætlanini, soleiðis at hon verður sett í verk sum skjótast.

***Við bestu ynskjum***

---



Dagfinnur Danbjørg

## Tað privata skal byggja Skálafjarðartunnilin – Landskassin skal ikki váða (vinna) nakað

*Hetta var klára niðurstøðan hjá Anniku Olsen í SVF í fyrrakvøldi. Hon segði váða fleiri ferðir, men átti at sagt vinna, tí tunnilin er eitt vinnaraprojekt*

Fyri mongum mongum árum síðani, hoyrdi eg frágreiðing um, hvussu fólkafloksmenn í Danmark høvdu fyri vana at skjóta javnaðarmonnum í skógvarnar, at tað almenna ikki var ført fyri at reka nakað við yvirskoti. Í tí aktuella málinum snúi tað seg um sporvagnarakstur í Keypmannahavn. Teir privatu vístu á, at meðan teir høvdu sporvagnarakstur in um hendi, so gav hann yvirskot, men raksturin gav undirskot, tá tað almenna tók yvir. Teir tosaðu ongantíð um, at meðan teir stóðu fyri rakstrinum, koyrdu sporvagnarnir bert eftir teimum fólkaríku høvuðsvegunum, meðan tað almenna, ið skuldi tæna øllum borgarunum á jøvnum føti, eisini koyrdu í síðugøtunum og í meira fólkatunnum umráðum. Eisini teir fjaldu sannleikan, tí teir vildu fremja egin áhugamál.

Vit eru mong, ið minnast, tá tey privatu róku partar av ferðafólkflutninginum. Vit minnast eisini, at tað vóru tær yvirskotsgevandi ruturnar, ið fólkafloksfólkini sótu á, meðan landið mátti taka sær av teim undirskotsgevandi, og tá tær yvirskotsgevandi ikki longur góvu yvirskot, so vórðu tær handaðar landskassanum. Ongin bjóðaði sær at yvirtaka Smyril, og tað hevur eingin heldur gjørt - mær vitandi - til dagin í dag.

Síðst í -70-unum sigldi Smyril eisini túrar til Skotland. Men tá hávaslagið luktaði, at Skotlandssiglingin gav pening í kassan, spentu teir saman við fólkaflokkinum so hart á samgonguna, teir sótu í, at hon slitnaði. Teir góðtóku undir ongum umstøðum, at tað almenna røkti uttanlandasigling við succes, nei hávaslagið átti alt yvirskotsgevandi, kosta hvat tað kosta vildi.

Tað seinasta vit hava hoyrt frá uttanlandssiglingini er, at hon eisini hevur silgt í landskassanum og "over night" skorað 30 mill. kr, sjálvt um sagt verður, at tað almenna manglar nógv í at kunna røkja sínar skyldur.

So hávasloganið sær út til at ljóða: alt úr landskassanum - onki í hann.

Og tað er júst tað, ið eisini er talan um í Skálafjarðart unnlamálinum. Øll sakkøn siga, hvussu einastandandi góðir møguleikar eru fyri, at hann fer at geva eitt risa avkast, og av somu orsøk skal landskassin haldast longst møguligt burtur frá hesum projekti. Tað er nemliga ikki váðin hann skal haldast burtur frá, men vinninginum. Landskassans projektir eru harafturímóti, Sandoyar og Suðuroyartunnlarnir, sum fara at geva stór undirskot, so har eigur landskassin undirskotini, og tað er eftir hávaprincippi bert tílikt, ið hoyrir landskassanum til.

Við síni útsøgn, sigur Annika ikki tað, ið hon veit, men tað, ið hávarnir og annars fólkafloksfólk í teim ymsum flokkum forvænta, at hon skal siga. Og so er søgan ikki longri - væl at merkja, um ikki tey, ið eru góð við landskassan, saman við sandoyingum og suðuroyingum, og annars við øllum teimum, ið halda, at landskassin, ið er okkara felags húsarhaldskassi, eisini eigur at vera við og standa fyri projektum, sum geva yvirskot. Um øll hesu og onnur við sláa seg saman og í felag staðfesta: At nú er meira enn nokk við førdum hávapolitikki, --so gangi eg út frá, sum givið, at politikkararnir taka annað skinn um bak og framyvir ikki bert arbeiða fyri einstaklingar, men fyri fjøldina. Annars verður val skjótt, og tá fáa vit øll høvi til at velja millum politik fyri einstaklingar ella politik fyri fólkið.